# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

# Føroyingar mugu venja alt árið




Frank Arnesen sigur, at NM-kappingin er sera væl fyriskipað og at fyrireikararnir hava rós uppiborið fyri tað. Hann heldur, at kappingin hevur verið ógvuliga spennandi, men sigur samstundis, at ongin sáttmáli verður gjørdur í nærmastu framtíð

**Føroyingar mugu venja alt árið, um vit ynskja at lyfta føroyska fótbóltsstøðið her heima. Tað sigur Frank Arnesen millum annað, í samrøðu við Sosialin í dag**

ORÐ & MYNDIR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

NM-kappingin fyri U17-landslið er av. Venjararnir venda nú heim til sítt dagliga yrki og leikararnir til feløg síni, har teir hava sína dagligu gongd. Men tað eru ikki bara venjarar og leikarar og heldur ikki bara dómarar, sum hava verið til arbeiðis i samband við NM-kappingina.

Síðani mánadagin í farnu viku hava fleiri talentskótar frá evropeiskum stórfeløgum verið í Føroyum, fyri at vita um teir kunnu knýta okkurt stjørnuskoti at felagi teirra.

Her er talan um umboð fyri stórfeløg sum Arsenal, Liverpool, Manchester United, Schalke 04, Ajax og PSV Eindhoven, so tað var altso ikki hvør sum helst, ið var komin at hyggja at leikarunum.

Men hóast talan var um fleiri kend nøvn millum hesar talentskótar, so var tað serliga eitt navn, ið flestir ítrottaráhugaðir føroyingar komast við, og tað er Frank Arnesen. Maðurin við ábyrgdini fyri ungdómsarbeiðinum hjá Chelsea - ensku meistararnir og felagið við øllum milliardunum.

## NM hevur høgt støði

Sosialurin hevði avtalu við Frank Arnesen leygardagin á miðdegi, um at fáa eitt lítið prát aftan á dystirnar hjá føroyska U17- og U19-landsliðnum.

Veðrið er so mikið illfýsi, at vit gera av at fara inn í FSF-húsið at práta aftur við einum krússi av kaffi, og eg spyrji hann, hvat honum dámar kappingina?

– Eg haldi tað vera eina ógvuliga áhugaverda kapping, har støðið hevur verið høgt. Og frá teimum, sum hava fylgt við longi havi eg skilt, at hetta er besta kappingin seinastu trý árini, greiðir Frank Arnesen frá.

Hóast hann hevur arbeitt sum talentskóti í fleiri ár, er hetta fyrsta ferðin, at hann er við til NM-kappingina fyri U17-landslið.

Og av tí sama hevur Frank Arnesen lagt seg eftir at síggja øll liðini spæla.

- Ja, nú dysturin millum U17-landsliðið hjá tykkum og Noreg er av, havi eg sæð øll liðini uttan tykkara U19-landslið spælt, og tað hava verið nakrir spennandi dystir at fylgt. Og nú er tað eisini soleiðis, at eg eri ikki einsamallur her í Føroyum og hyggi. Við mær havi eg tríggjar talentskótar, so vit hava helst fleiri ting, vit skulu kjakast um, tá vit koma heimaftur, fortelur Frank Arnesen.

Tá hesi orðini eru søgd, koma tríggir mans prátandi inn í hølini við fanginum fullum av hotdogs. Frank Arnesen fær ein burtur av og tað sama ger Jákup í Stórustovu, sum hevur syrgt fyri øllum talentskótunum meðan teir hava verið í landinum.

Og í millum kaffi og hotdogs gongur fótbóltsprátið víðari.

- Kappingin hevur eisini verið ótrúliga væl fyriskipað og alt hevur gingið væl og verið væl avgreitt, og tað haldi eg eisini at fyrireikararnir hava rós uppiborið fyri. Einasta sum er keðiligt hjá okkum talentskótum er, at allir dystirnir hava verið leiktir samstundis, tí tá havi eg bert havt møguleikan at síggja ein dyst um dagin. Men fyri allar aðrar partar er tað best, at alt verður avgreitt samstundis, so tað er ikki meiri enn rímiligt at tað er so, sigur Frank Arnesen.

## Jákup verið millummaður

Jú, kappingin hevur gingið væl, tað kunnu øll, sum hava fylgt bara nøkulunda við, verða samd í. Men Frank Arnesen hevur ikki bara hug at rósa góðu fyriskipanini.

– Jákup hevur verið ein ótruliga góður maður hjá okkum, sigur Frank Arnesen og ristir í økslina á Jákup í Stórutovu.

- Hann hevur gjørt eitt stórt fyrireikandi arbeiði, og hevur allatíðina vita og havt allar upplýsingar, sum vit hava vilja havt fatur í. Og tá vit so ikki hava hugt eftir dystum ella arbeitt á annan hátt, hevur Jákup skipað fyri ymsum tiltøkum og túrum fyri okkum og tað hevur verið framúr, sigur Frank Arnesen.